COVID-19 | CORONA

# HANDLAR OG **SMITTUFYRIBYRGING**



Ger tað møguligt hjá viðskiftafólki at spritta hendur, tá tey koma inn í handilin.

Spritta handtøk á kurvum og vognum regluliga. Spritta handtøk á hurðum, um handilin ikki hevur sjálvvirkandi hurðar.

Avmarka talið av fólki í handlinum, soleiðis at tað er møguligt at halda almennu tilmælini um, at ikki fleiri enn 10 fólk savnast og at fólk halda eina frástøðu á 2 metrar.

Avmarka í størstan møguligan mun beinleiðis samskifti millum starvsfólk og kundar.

Set strikur í gólvið framman fyri kassan við einum millumrúmi á 2 metrar, soleiðis at fólk í bíðirøð betri kunnu fylgja tilmælinum um at halda eina frástøðu á 2 metrar. Lat bert eitt viðskiftafólk leggja vøru á kassabandið í senn, soleiðis at fólk ikki standa tætt framman fyri kassan.

Starvsfólkið við kassan eigur at nýta einnýtishandskar fyri at verja seg móti smittu frá vørum. Starvsfólkið eigur at skifta handskarnar, tá tað fer frá kassanum. Starvsfólkið eigur eisini at hava møguleika fyri at spritta hendurnar, tá hetta er neyðugt.

Um tað ber til, verður tilmælt at ein glas-/plastveggur verður settur upp framman fyri starvsfólkið, sum situr við kassan. Hetta fyri at verja móti kundum, ið kanska njósa ella hosta.

Um tað ber til, verður tilmælt at flyta gjaldsterminalin soleiðis, at hann ikki er beint framman fyri starvsfólkið.

Ger tað møguligt hjá kundum at spritta hendur, tá tey fara úr handlinum og hava nortið við innkeypskurvar og vognar.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE WORK ENVIRONMENT AND FIRE SAFETY AUTHORITY

TILMÆLI UM SKIPAN OG ATFERÐ Á **ARBEIÐSPLÁSSINUM**

**Les meiri á www.corona.fo og www.arb.fo.**